Formansfrágreiðing 2014/15

Í blaðgrein fyrst í hesum árinum skrivaði eg, at í 2015 eiga vit at vera ídnari at flyta okkum úr føgru orðunum um brekøkið til ítøkiligu broytingarnar, sum muna. Føgru orðini eru sjálvsagt ikki til fánýtis, tí tað er har, alt byrjar, og vit kenna eisini eitt alment ynski um at raðfesta brekøkið. Sigast kann ikki annað enn, at 2014/15 hevur verið eitt hendingaríkt ár fyri MBF.

Vitjan í Sameindu tjóðum

Ein av stóru hendingunum var verkætlanin við skuggafrágreiðingini viðvíkjandi ST sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek, sum byrjaði í januar, tá ið frágreiðingin varð send ST nevndini.

Í tveimum umførum var MBF í ST, og hevur í báðum førum hildið røðu fyri ST nevndini, umboða limafeløgini og tala søk teirra. Hetta hevur verið ein spennandi tíð, har vit longu nú síggja úrslit.

Í september komu tilmælini úr ST og hevur Almannaráðið, Vinnumálaráðið og Mentamálaráðið verið áhugað í teimum og á hesum málsøkjunum síggja vit ítøkiligar broytingar.

Yvirskipaða ábyrgdin av íverksetanini av ST sáttmálanum og uppgávan at breiða út tilmælini til føroyingar, sum ST nevndin mælir til verða sett í verk, er nú staðfest at liggja í Almannaráðnum.

Eisini hevur Almannaráðið týtt endaligu tilmælini, sum ST nevndin sendi Føroya Landsstýri, til føroyskt, og liggja tey nú á mbf.fo. Enn er hetta tó ikki gjørt á teknmáli og í lætt atkomuligum sniði á heimasíðuni hjá Føroya Landsstýri um mannarættindi.

Yvirskipaða óhefta eftirlitið við ST sáttmálanum er enn ikki klárt, og er MBF í samráð við Almannaráðið um hetta.

Umstøðurnar betraðar

Umstøðurnar hjá teimum, ið bera brek, eru ymiskar, og tað velst tí um, hvat sjónarhornið er, tá ið tosað verður um, hvussu støðan er. Sum heild er hugburðurin hjá føroyingum opin og vit kunnu vera samd um, at umstøðurnar eru betraðar seinastu árini.

Ítøkiligar broytingar og frambrot í 2014/15, aftur at teimum, sum eg annars nevni í frágreiðingini, eru t.d.:

- MBF er umboðað í arbeiðsbólki, ið skal gera tilmæli um ein tænastupolitikk á almannaøkinum í Føroyum
- Almannaráðið hevur á fíggjarlógini játtað kr. 400.000,- til skrivitulk
- Bíðilistin í barna- og ungdómspsykiatriini er minkaður úr hálvum øðrum ári niður í tveir til tríggjar mánaðir
- Nýggj sending í KVF er tekstað og arbeitt verður við at víðka um atkomu
- Byrjað er at gera eina yvirordnaða ætlan fyri brekøkið
- Kærkomnar broytingar á bústaðarøkinum

Fylgjarakort

Nýbrot var avtalan um fylgjaraskipan, sum varð sett í gildi 1. Januar 2015. Í fyrstu atløgu vóru tað teir stovnar, sum fáa rakstrar- ella stuðulsjáttan á fíggjarlógina frá ávikavíst Mentamálaráðnum og Vinnumálaráðnum, sum fylgjarakortið fevnir um. Avtalan varð undirskrivað 18. desember 2014.

Hósdagin 29. januar 2015 varð fylgjaraavtalan víðkað á brúnni á Norrønu, tá avtala millum Smyril Line og MBF varð undirskrivað.

Seinasta avtalan um fylgjarakort varð undirskrivað fríggjadagin 24. apríl 2015, og var hon ímillum Kommunufelagið og MBF.

MBF metir avtalurnar um fylgjarakort sum eitt nýbrot innan brekøkið, og eru vit fegin um tann góða viljan, sum landsstýrisfólkini, Smyril Line og Kommunufelagið hevur vístur. Fyri limafeløg í MBF hava avtalurnar stóran týdning og koma at javnseta føroyingar.

Parkeringskort

1. mars fóru gomlu avlamisskeltini úr gildi, og tí skulu øll, sum høvdu gamla avlamisskeltið, søkja um nýtt parkeringskort. Hósdagin 26. mars 2015 vórðu fyrstu nýggju parkeringskortini handað í MBF húsinum. Hesi parkeringskortini, sum MBF gevur út fyri Akstovuna, kunnu eisini nýtast í útlondum.

Tilmælið um serliga skipað miðnám

30. januar 2015 varð "Tilmæli um serliga skipað miðnám sum heildartilboð til ung við serligum tørvi" handað, og hevði MBF umboð í bólkinum, sum orðaði tilmælið. Í ST-sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek, verður lagt upp til eina inkluderandi skúlaskipan. Í tráð við hetta leggur tilmælið upp til, at serliga skipað miðnám er á vanligu miðnámsskúlunum.

Skúlatilboð til ung við serligum tørvi hava vantað í fleiri ár og er tørvurin stórur. Tilmælið, sum varð handað landsstýrisfólkunum í Mentamálum og Almannamálum, leggur upp til, at ein skipað tilgongd skal setast í verk frá skúlaári 2015/16, soleiðis at áleið 120 næmingar við serligum tørvi koma at ganga á serliga skipaðum miðnámsskúlatilboðum í 2018, tá ið skipanin er fult útbygd. Skúlatilboðini skulu samskipast við stuðulsfyriskipanum, sum næmingar hava tørv á eftir skúlatíð. Tískil verður lagt upp til neyvt samstarv millum Mentamálaráðið og Almannamálaráðið. Her krevst eisini fíggjarlig raðfesting, um hesar ætlanir skulu bera á mál.

Atkoma er lykilin

Atkoma í víðastu merking er lykilin til virkna lívið og eigur at vera lyklaorð fyri komandi árið. Atkomu finna vit eisini í hugtakinum universelt design, har endamálið er at skapa vørur og annað soleiðis, at so mong sum gjørligt fáa gagn av tí næstan uttan mun til, hvør likamliga ella sálarliga støðan er.

Hvør einstakur borgari eigur at hugsa um atkomu fyri øll. Politiska skipanin skal ganga á odda, men vit eiga at arbeiða fyri, at Føroyar gerast landið, har allir borgararnir setta atkomu í víðastu merking á dagsskrá.

Atkomuliga hugsanin hevði t.d. gjørt, at allar føroyskar sendingar í KVF vórðu tekstaðar, at skrivstovur, handlar og onnur stød, har føroyingar koma, vórðu atkomulig fyri øll, at fólkaskúlin gjørdist meira inkluderandi, at skipað var fyri innsavnan, greining og útbreiðslu av hagtølum eftir kyni, aldri, breki og bústaði, at fleiri fólk, ið bera brek, vóru úti á arbeiðsmarknaðinum, og at kommunurnar gjørdu eina ætlan fyri brekøkið.

Móðurmálsdagurin 25. mars gav veruliga orsøk at meta høgt tað megnar arbeiðið, sum lagt verður í føroyska málið fyri allar føroyingar. Ymiskleiki krevur ofta nógv, men tá ið fólk bjóða ymiskleikanum av og fáa úrslit, vit als ikki kundu hugsað okkum at verið fyri uttan, eiga vit at vera takksom fyri slóðbrótarar.

Vit eiga óivað eisini við hesum í huga at síggja hvønn dag sum móðurmálsdag, har vit menna málið í síni heild og geva hvør øðrum ymiskliga atkomu til málið, sum í víðastu merking fevnir bæði um samleika og mentan okkara, og sum gevur hugsanum og dreymum okkara lív.

Nýggj heimasíða

1. september fekk MBF nýggja heimasíðu. Heimasíðan er andlitið úteftir og við frískum liti og tíðarhóskandi tilfari vóna vit, at hon verður nýtt. Á heimasíðuni eru tíðindi um brekøkið, greinar, víst verður á sáttmálar, sum eru undirskrivaðir, og eisini ber hon boð um, at flestu øll eru samd um, at føroyingar skulu vera javnstillaðir.

Tá ið eg segði í byrjanini, at í komandi tíð eiga vit at vera ídnari at flyta okkum úr føgru orðunum um brekøkið til ítøkiligu broytingarnar, so hugsi eg serliga um at fáa tað, sum longu er sett á skinnarar innan útbúgving, bústaðir og atkomu sum heild, sett í verk, so at vit veruliga síggja munagóðar loysnir, sum gagna teimum, sum hava tørv á teimum.

At enda

At enda vil eg fegin takka tykkum øllum fyri ótroyttiliga arbeiði tykkara at menna brekøkið og at bøta um korini hjá limum tykkara.

Tóra við Keldu, forkvinna